# Fyrstu ferð á val

Ein dagin í farnu viku vóru tær báðar vinkonurnar, Dora og Durita farnar út at trilla við børnum sínum í Runavík.

Ein slíkan góðveðursdag slepst kortini ikki undan at fáa sær ein bita, og hvar er meiri natúrligt at fara inn enn í næstu mastovuna í býnum – Blikk-café'ina.

Her bíløgdu tær ein góðan bita til sín og børnini. Men ikki fingu tær frið at eta rættiliga leingi, fyrrenn umboð fyri Rás 2 komu at órógva friðarligu løtuna.

Viðkomandi vildi vita, hvat tær hugsaðu um politikk og valtjakið. Hetta hevði ikki teirra stóra áhuga, hóast tað er fyrstu ferð at tær skulu til valborðið. Tær báðar vóru kortini ikki í iva um, at tær fóru at velja Miðflokkin.

- Men veit, hvat flokkurin stendur fyri, siga tær báðar.

**sb.**



*Ein góður biti kemur altíð væl við – vinstrumegin Dora og hinumegin borðið Durita*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hjartamál 4/5 Ríkt umhvørvi

Vit, mammur og pápar í Føroyum

Nú skulu okkara umhvørvi og tilfeingi tryggjast børnunum

TJÓÐVELDI

**Náttúran er bert til láns.** Hetta er sannari nú enn nakrantíð. Føroyar eiga at taka altjóða ábyrgd og ganga á odda í tilfeingisrøkt. Tað er okkara skylda at tryggja, at børn okkara eisini kunnu njóta okkara ríka umhvørvi.

Tjóðveldi hevur fimm hjartamál: Altjóða samstarv, Okkara samleiki, Full ábyrgd, Ríkt umhvørvi og Veruligt frælsi. Greið mál og klokkuklárar hugsjónir um einar frælsar Føroyar.



Les meira á **www.tjodveldi.fo**